Dagf. 30. juni 2022
HMR j. nr. 22/12149-4

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-216/2021 eftir § 52a í tingskipanini um kapellið á Landssjúkrahúsinum, frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvør er orsøkin til, at kapellið á Landssjúkrahúsinum ikki er tøkt í løtuni?
2. Nær kann roknast við, at kapellið aftur kann brúkast sum kapell?

Svar:

Til spurning 1 og 2

Kapellið á Landssjúkrahúsinum lat aftur fyri sløkum hálvumtriðja ári síðani, tá koronafarsóttin av álvara tók seg upp í Føroyum. Í sambandi við fyrireikingarnar til sambindingina millum verandi og nýggja sjúkrahúsbygningin, hevur verið neyðugt at finna eina fyribils staðseting til seingjavaskið, og sambært Landssjúkrahúsinum verða hølini í løtuni brúkt til hetta endamál.

Enn er ikki heilt greitt, nær arbeiðið við sambindingini verður endaliga liðugt, og tað aftur verður møguligt at nýta hølini til kapell.

Heilsumálaráðið, 30. juni 2022

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður